# TÚRAR VIÐ FERÐALEIÐARA TIL HEIMSINS STØRSTA DRUNNHVÍTABØLI Í NÓLSOY



*Innivist í "Kaffistovuni"*



**Drunnhvíti - Storm Petrel - Lille stormsvale - Havsvale - Sturmschwalbe - Océanite Tepête**



# Lýsing av túrinum

*Kostnaður 550.00 kr.: Uppreidd song.*
*Kostnaður 450.00 kr.: Madrassa, tygum skulu hava soviposa við.*

*Matur og ferðaútreiðslur til Nólsoyar eru ikki íroknaðar í kostnaðin.*

*Lýsing av túrinum: Fráferð úr Tórshavn kl. 18.00.*
*Jens-Kjeld tekur ímóti tygum niðri við ferjuna í Nólsoy kl. 18.20.*
*Hann gevur eina stutta frágreiðing, og fylgir tygum síðani til Kaffistovuna, har tygum skulu gista. Tygum kunnu síðani gera, hvat tygum hava hug til - ganga ein túr í bygdini, ella fáa tygum ein lítlan blund.*
*Minnist til at ganga á gøtunum, verið farið út úr sjálvari bygdini.*

*Umleið ein tíma áðrenn sólsetur, førir Jens-Kjeld tygum til heimsins størsta drunnhvítabøli.*
*Tað tekur umleið 1 tíma at ganga út til bølið, har tygum tann næsta 1-1½ tíman kunnu eygleiða hesar hugvekjandi náttarfuglarnar.*
*Tygum fáa høvi at síggja ymiskar aðrar fuglar, so sum lundar og nátar, á túrinum .*
*Heimafturkomin av túrinum verður borðreitt við kaffi ella te í Kaffistovuni (íroknað í kostnaðin).*

*Tygum skulu verða farin úr rúminum á Kaffistovuni seinast kl. 12.00, um ikki annað er avtalað.*

*Minnist til at taka heit klæði, regnklæði og stivlar við.*

*Túrar verða gingnir frá 1. juni til 15. september sambært nærri avtalu.*

*Luttakaratal minst 4 persónar. Avsláttur verður latin til størri bólkar.*

*Fyrivarni verður tikið fyri kostnaðarbroytingum!*


*Bílegging: Jens-Kjeld Jensen, Telefon (+298) 327064 / T-postur: jkjensen@olivant.fo*

*Ella: Kaffistovan: Telefon (+298) 327175 / (+298) 327025*